gult22 cyan22 magenta22 svart22



## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCM | 25 | 13- 7 - 5 | 44 | 33 | 11 | 46 |
| 2 | Silkeborg | 25 | 12- 10- 3 | 38 | 27 | 11 | 46 |
| 3 | Brøndby | 25 | 13- 5 - 7 | 58 | 33 | 25 | 44 |
| 4 | FCK | 25 | 11- 10- 4 | 38 | 21 | 17 | 43 |
| 5 | Viborg | 25 | 11- 6 - 8 | 41 | 29 | 12 | 39 |
| 6 | Lyngby | 25 | 11- 5 - 9 | 35 | 41 | -6 | 38 |
| 7 | OB | 25 | 10- 4 -11 | 39 | 35 | 4 | 34 |
| 8 | AaB | 25 | 8 - 9 - 8 | 38 | 37 | 1 | 33 |
| 9 | AGF | 25 | 8 - 4 -13 | 38 | 50 | -12 | 28 |
| 10 | AB | 25 | 5 - 11- 9 | 32 | 33 | -1 | 26 |
| 11 | Herfølge | 25 | 5 - 8 -12 | 29 | 47 | -18 | 23 |
| 12 | HFK Sønderj. | 25 | 1 - 5 -19 | 24 | 68 | -44 | 8 |

## Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Esbjerg | 22 | 13- 7 - 2 | 55 | 20 | 35 | 46 |
| 2 | Køge | 22 | 13- 7 - 2 | 49 | 23 | 26 | 46 |
| 3 | Frem | 22 | 13- 6 - 3 | 51 | 21 | 30 | 45 |
| 4 | Vejle | 22 | 12- 6 - 4 | 53 | 26 | 27 | 42 |
| 5 | B93 | 22 | 11- 3 - 8 | 42 | 31 | 11 | 36 |
| 6 | Farum | 22 | 10- 5 - 7 | 41 | 28 | 13 | 35 |
| 7 | Brønshøj | 22 | 11- 2 - 9 | 46 | 45 | 1 | 35 |
| 8 | B 1913 | 22 | 8 - 7 - 7 | 30 | 32 | -2 | 31 |
| 9 | AC Horsens | 22 | 7 - 9 - 6 | 28 | 30 | -2 | 30 |
| 10 | Hvidovre | 22 | 6 - 8 - 8 | 41 | 42 | -1 | 26 |
| 11 | Randers F. | 21 | 7 - 5 - 9 | 29 | 37 | -8 | 26 |
| 12 | Skive | 22 | 5 - 7 -10 | 37 | 56 | -19 | 22 |
| 13 | Ølstykke | 22 | 5 - 4 -13 | 27 | 58 | -31 | 19 |
| 14 | Fremad A | | 224 - 6 - | 12 | 30 | 48 | -18 |
| 18 | | | | | | | |
| 15 | FC Aarhus | 22 | 2 - 8 -12 | 23 | 54 | -31 | 14 |
| 16 | Birkerød | 21 | 1 - 4 -16 | 22 | 53 | -31 | 7 |

## Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tromsø | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 0 | 5 | 6 |
| 2 | Viking | 2 | 2 - 0 - 0 | 7 | 4 | 3 | 6 |
| 3 | Odd. Grenl. | 2 | 1 - 1 - 0 | 4 | 1 | 3 | 4 |
| 4 | Lillestrøm | | 2 1 - 1 - | 0 | 2 | 1 | 1 |
| 4 | | | | | | | |
| 5 | Molde | 2 | 1 - 0 - 1 | 5 | 3 | 2 | 3 |
| 6 | Rosen-borg | 2 | 1 - 0 - 1 | 5 | 5 | 0 | 3 |
| 7 | Brann | 2 | 1 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 3 |
| 8 | Sogndal | 2 | 1 - 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 3 |
| 9 | Stabæk | 2 | 1 - 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 3 |
| 10 | Strøm-godset | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 4 | -1 | 1 |
| 11 | Lyn | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 12 | Bryne | 2 | 0 - 1 - 1 | 0 | 1 | -1 | 1 |
| 13 | Bodø/ Glimt | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 5 | -3 | 1 |
| 14 | Moss | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Den Bosch + | 29 | 22- 3 - 4 | 57 | 18 | 39 | 69 |
| 2 | Excelsoir + | 29 | 17- 5 - 7 | 74 | 57 | 17 | 56 |
| 3 | FC Zwolle | 28 | 13- 9 - 6 | 60 | 37 | 23 | 48 |
| 4 | Volendam + | 29 | 14- 5 - 10 | 47 | 38 | 9 | 47 |
| 5 | G.A. Eagles | 27 | 14- 4 - 9 | 54 | 50 | 4 | 46 |
| 6 | Helmond Sp. | 29 | 11- 8 - 10 | 61 | 44 | 17 | 41 |
| 7 | Cambuur/L. | 28 | 11- 9 - 8 | 44 | 40 | 4 | 42 |
| 8 | Telstar | 28 | 11- 6 - 11 | 36 | 44 | -8 | 39 |
| 9 | Top/Oss | 29 | 13- 2 - 14 | 50 | 52 | -2 | 41 |
| 10 | Eindhoven | 29 | 11- 7 - 11 | 51 | 49 | 2 | 40 |
| 11 | Emmen | 28 | 10- 6 - 12 | 48 | 51 | -3 | 36 |
| 12 | Heracles A. | 28 | 9 - 8 - 11 | 33 | 44 | -11 | 35 |
| 13 | BV Veendam | 28 | 10- 4 - 14 | 46 | 59 | -13 | 34 |
| 14 | Dordrecht '90 | 28 | 8 - 8 - 12 | 48 | 50 | -2 | 32 |
| 15 | ADO Den Haag | 28 | 8 - 7 - 13 | 44 | 58 | -14 | 31 |
| 16 | MVV | 28 | 9 - 3 - 16 | 35 | 52 | -17 | 30 |
| 17 | Harlem | 28 | 6 - 9 - 13 | 36 | 54 | -18 | 27 |
| 18 | VVV | 28 | 7 - 3 - 18 | 32 | 50 | -18 | 24 |

# FCK megnar ikki at gera mál

**Tað kann fara at vísa segkostnaðarmikið, at tað – hóast leikliga yvirvág – ikki eydnaðist at gera mál ímóti AB**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Karmarnir vóru avbera góðir í Parkini sunnudagin. 17.798 áskoðarar vóru møttir fyri at fylgja við í grannastríðnum millum FCK og AB. Tað var spennandi alla tíðina, men tað var ikki serliga skakandi. Tað eydnaðist hvørum partinum at fáa bóltin í málið. Hetta vóru teir í AB mest nøgdir við. Málleysi javnleikurin hevði við sær, at frástøðan aftur til Herfølge, sum er á øðrum niðurflytingar plássinum, øktist til trý stig.

Í FCK var lagið einki serligt. Eftir at hava spælt fýra ferðir upp í slag á útivølli, vóru teir aftur í Parkini. FCK hevur vunnið tveir av útidystunum, og tveir av teimum eru endaðir við javnleiki. Hetta eru teir í FCK væl nøgdir við. Men teir í FCK eru ikki nøgdir við, at tað ikki eydnaðist teimum at fáa fulla úrtøku burturúr ímóti AB.

Málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir, men FCK hevði teir størstu. Serliga í 1. halvleiki var ferðin einki at reypa av, og tað eydnaðist stak illa hjá FCK at bróta ígjøgnum í borðunum og at leggja krossbóltar í brotsteigin. Tað var ætlað, at krossbóltarnir skuldi gera, at álopsmenninir báðir, Pascal Simpson og Heine Fernandez, komu til málmøguleikar.

Heine Fernandez, sum ikki tykist vera rættuliga fallin til í FCK, rakti eina ferð tvørtræið, og eina ferð var Christian Lønstrup púra leysur, men hann sendi við síðuna av málinum.

Donsku fjølmiðlarnir siga, at tað í fremstu ræð týðuliga var saknur í Zuma, sum var leikbanaður, og í Toda Jónsson. Fjølmiðlarnir eru eirindarleysir í sínum dómi yvir Pascal Simpson, sum teir meta vera langt frá stórforminum.

Tá seinna umfarið var gott og væl hálvrunnið, gjørdi FCK venjarin, Roy Hodgson, av at skifta út. Í staðin fyri Pascal Simpson kom Todi Jónsson á vøllin. Todi hevur verið skaddur í ein mánað (síðani landsdystin í Luksemburg). Donsku fjølmiðlarin staðfesta, at um bæði Todi Jónsson og Zuma eru á liðnum, og teir eru í fullgóðari venjing, so er talan um mest vandamikla álopsparið hjá FCK. Men samstundis halda miðlarnir, at tað sæst aftur, at Todi ikki er í fullgóðari venjing. Snúringarnar eru ikki so góðar enn, sum tær plaga at vera, staðfestir eitt av bløðunum.

Komandi mánakvøld skal FCK spæla á útivølli ímóti Silkeborg. Hetta verður mettur at vera ein sera týdningarmikil dystur, sum er av alstórum týdningi fyri vánirnar hja FCK at vinna DM.

### Hálvsnávaðu

Brøndby er framvegis eit gott boð upp á meistaraheitið. Komandi sunnudag skulu teir spæla sera týdningarmiklan dyst. Tá kemur nýggja oddaliðið, FCM, í Brøndby at vitja.

Sunnudagin sá tað rættuliga dimt út hjá Brøndby. Ti var tað ikki so undarligt, at teir eftir dystarlok vóru nøgdir við 2–2 javnleikin í Aalborg. Tá tað restaðu tíggju minuttir var AaB frammanfyri 2–0, men so vístu teir bláu og gulu enn eina ferð, at teir megna at stríðast, eisini tá tað ikki hevur gingið eftir vild. Hetta var fjórði dysturin upp í slag, at tað ikki eydnaðist hjá AaB at vinna.

Johan B. Hansen tykist púrasta at hava mist plássið í besta hópinum hjá OB. Hesa ferð vóru fleiri av stuðulsspælarunum buturi frá. Men kortini var ikki pláss fyri Johan B. Hansen. Á heimavøllinum vann OB 3–1 á botnliðnum úr HFK Sønderjylland, sum longu er flutt niður í næstbestu deildina.

AGF og Viborg stóðu fyri største ella besta dramainum í 25. umfarinum í donsku kappingini. Endin var, at Viborg vann 4–3. Harvið er AGF framvegis ikki heilt leyst av botnstríðnum.

Silkeborg helt tørn um góðu gongdina, og Lyngby, sum hevði heimavøll fullførdi kiksini frá páskafrítíðini. Silkeborg vann 2–0.



*FCK hevði fleiri góðar møguleikar móti AB, men tað eydnaðist ikki liðfeløgunum hjá Toda at umseta hesar til mál*

gult23 cyan23 magenta23 svart23



# Føroyameistarar 2001

**Tá vit í undanfarnu viku umrøddu FM í talv fyri einstaklingar, vóru ongar myndir av teimum, sum vunnu heitið í ymsu bólkunum. Niðanfyri prentað vit myndir av nýkosnu føroyameistarunum**



*Nýggjur føroyameistari í talvi er IM John Rødgaard*
*Mynd: Sveinur Thomassen*



*Olaf Berg úr Havnar Talvfelag gjørdist vinnari av almenna bólkinum*
*Mynd: Sveinur Thomassen*



*Í unglingabólkinum gjørdist Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði ein sannførandi vinnari*
*Mynd: Sveinur Thomassen*



*Gomlu kempurnar dystaðust sjálvsagt eisini, og her eydnaðist tað Peturi Højgaard úr Vestmanna Talvfelag at vinna*
*Mynd: Sveinur Thomassen*

## Vakurleikatalvið

**Hetta talv bleiv kosið vakrasta talv í FM 2001. Eitt vilt og áhugavert talv, serliga tá hugsar verður um at tað er frá 1. umfari, tá telvarar oftani er heldur varligir.**

Rani Nolsøe (2185) - Jóan Hendrik Andreassen (2090)
FM, Landsliðsbólkurin Vestmanna (1), 07.04.2001

1.e4 c5 2.Nf3 d6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 e5 5.Bb5+ Nd7 6.Nf5 a6 7.Bxd7+ Qxd7 8.Nc3 Nf6 9.0-0 d5 10.f4!? (Áhugaverdur leikur, og eftir hetta valdar kríggj á talvborðinum) 10...Bc5+ 11.Kh1 Nxe4 12.Nxg7+ Kf8 13.Nxe4 dxe4 14.Qh5! (Vinnandi flottur leikur) 14...e3 15.fxe5 Kxg7 16.Bxe3 (Hvítur telvar hart og áhugavert, hevur offrað heili tveir mans eftir bert sekstan leikum, og stendur betur. Betur hevði tó verið frúgvaskákið á g5 og síðani leika e6) 16...Bxe3 17.Rae1 Bd2? (17...Qe7 18.Rxe3 betri alternativ fyri svartan, men hvítur hevur gott spæl fyri bispin) 18.e6!



(Endabresturin) 18...Qxe6 19.Rxe6 Bxe6 20.Qe5+ Kg8 21.Rf3 h6 22.Rg3+ Bg5 23.h4 Rh7 24.hxg5 hxg5+ 25.Kg1 g4 26.Qf6 Rh5 27.Re3 Rf5 28.Qe7 b5 29.Re4 1-0

John Rødgaard (2345) - Eyðun Nolsøe (2185)
FM, Landsliðsbólkurin Vestmanna (7), 11.04.2001

1.c4 c5 2.Nf3 Nf6 3.Nc3 e6 4.g3 b6 5.Bg2 Bb7 6.0-0 Be7 7.d4 cxd4 8.Qxd4 d6 9.Bg5 a6 10.Bxf6 Bxf6 11.Qd3 Ra7 12.Rad1 Bxc3 13.Qxc3 0-0 14.Rd4 Bxf3 15.Bxf3 Rd7 16.Rfd1 Qc7 17.e3 Rfd8 18.Qb3 Nc6 19.Bxc6 Qxc6 20.Qd3 a5 21.e4 g6 22.b3 Qc5 23.a4 h5 24.Kg2 Qc6 25.f3 Qc5 26.Qd2 Kg7 27.h4 f6 28.f4 Qc6 29.Kh2 Qc5 30.Kg2 Qc6 31.Kh2 Qc5 32.Qe2 f5 33.exf5 Qxf5 34.Re4 Kf7 35.Re1 Re8 36.Qd2 Qc5 37.R1e3 Rde7 38.Qe2 Qf5 39.Kg2 Rd8 40.Kh2 Rde8 41.Rd3 Qc5 42.Qd2 Rd8 43.Red4 Red7 44.Re3 Re7 45.Re5 dxe5 46.Rxd8 Kg7 47.Qb2 Kh7 48.fxe5 Rf7 49.Qd4 Qc6 50.Qd2 Qc5 51.Rd7 Rxd7 52.Qxd7+ Kh6 53.Qd2+ Kh7 54.Qf4 Qa3 55.Qf7+ Kh6 56.Qxe6 Qxb3 57.Qf6 Qc2+ 58.Kh3 Qxc4 59.Qh8# 1-0

# Gary Kasparov kemur til Føroya 8. juni

**Í døgunum 8-12. juni fær Talvsamband Føroyar slóbrótandi vitjan tá heimsins besti telvari kemur til Føroyar. Hann fer at telva simultantalv ímóti landsliðnum í Norðurlandahúsinum og venja unglingar okkara. Eisini fer Kasparov á Norðoyastevnuvitjan har stórt talvtiltak verður.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í apríl í fjør fór formaðurin í Talvsambandi Føroyar, Rani Nolsøe til Íslands har hann ætlaði sær, við samtykt frá TSF-nevndini, at koma á tal við Kasparov ella umboðsmann hansara, við tí í eyga at fáa hann hendan vegin. Kasparov og aðrir sterkir mans telvaðu tá kvikkapping í Reykjavík.

Eingin avtala var frammanundan gjørd og varð tí hendan ferð ein satsningur av TSF. Tað ótrúliga hendi at Rani fekk lítlan fund við umboðsmann Kasparovs, Owen Williams, sum var sera fryntligur og positivur. Eftir lokna kapping hittust Rani og Owen aftur, og tá var sjálvur Kasparov eisini til staðar. Mynd bleiv tikin av Rana og Kasparov, og seinastu orðini frá Owen tá teir mátti skunda sær víðari varð: "This summer or the summer in 2001".

Tískil endaði ferðin í Íslandi sera gleðilig, og hevur TSF síðani havt gott samskifti við Owen Williams. Loksins fyri einum mánaða síðani bleiv sáttmálur skrivaður millum TSF og Kasparov.

### Spennandi dagar

Fyribils stuðlar til hesa slóðbrótandi vitjan eru Føroya Sparikassi, sum eru høvuðsstuðlar, UMMS, Føroya Shell, Tórshavnar Býráð, Norðurlandahúsið, Klaksvíkar Býráð og Føroya Lívstrygging.

Ætlanin varð at kona Kasparovs skuldi vera við á ferðini, men skúlaskyldur forða henni, og tí verður Owen Williams ístaðin við á ferðini.

Í Havnini fer Kasparov at telva simultan í Norðurlandahúsinum ímóti landsliði okkara sum telur seks telvarar. Vanur er Kasparov at telva simultan, eitt nú vann hann heili 6-0 á Ísraelska landsliðnum herfyri, og vóru allir stórmeistarar og altjóða meistarar, men stuttligt hevði verið um onkur av okkara monnum fekk okkrurt stigið. Umframt telvingina í Havnini fer hann eisini at venja talvungdóm okkara, sum jú er grundarsteinurin undir framtíðar føroyskari telving. Kasparov hevur sjálvur gjørt sera nógv fyri ungómstelving kring heimin, har hann eitt nú hevur fingið telving inn í skúlar í fleiri londum.

Síðani gongur leið hansara til Klaksvíkar har stórt talvshow verður á Norðoyastevnu. Nógv ung sum gomul, roynd sum óroynd sleppa at royna seg ímót heimsins besta telvara í stórari talvsimultankapping.

Ikki bert talv verður á skránni, eisini fer TSF at sigla Kasparov undir vestmannabjørgini, umframt aðrar útferðir.



*Hóast hann nú er fyrrverandi heimsmeistari, so er einki at ivast í, at tað er ein livandi legenda innan talvheimin, sum nú kemur til Føroya*